# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Herluf 80 ár

Í dag fyllir Herluf Joensen, vanliga nevndur Herluf á Heygum, 80 ár. Hann er føddur í Hvalvík 7. apríl 1925, harhann hevur búð mest sum alla sína lívstíð. Herluf er sonur Jógvan og Jóhonnu Joensen á Heygum, bóndahjún í Hvalvík. Er giftur við Óluvu, dóttur Poul og Sannu Andreassen av Oyrarbakka. Herluf og Óluva eiga fýra synir: Jógvan Páll, Súni, Jeffri og Halldórur, umframt átta abba- og ommubørn: Beinta, Hallur, Bjørt, Pól, Brian, Allan, Talita og Óluva.



Hann fekk tíðliga saman við elstra bróðrinum ábyrgdina av arbeiðnum á garðinum. Faðirin, Jógvan av Heygum, var sjúkur og doyði longu tá Herluf var 16 ár. 19 ára gamal fór hann til Íslands at arbeiða á bóndagarði. Heimaftur komin var Herluf til skips, og aftan á arbeiddi hann á Hvalastøðini við Áir.

Gravkúgvin, sum Hvalvíkar kommuna keypti, nevnd Hvalvíkskúgvin, kom í 1950, og fekk Herluf tilboðið at vera traktorførari. Hetta var einasta gravkúgv í landinum og kom eisini at verða ein kollvelting innan vegagerð í Føroyum. Fyrsti vegur, sum varð gjørdur við gravkúgv, var millum Hvalvík og Áirnar og síðan Hósvík og Áirnar. Landsverkfrøðingurin sá stóra framstigið og vildi hava gravkúnna til Vestmanna at hjálpa SEV við vatnútbyggingini. Eftir tingingar við Hvalvíkar kommunu varð farið um fjallið við gravkúnni til Vestmanna.

Í 1956 avger Landsverkfrøðingurin at keypa gravkúgv og bjóðar Herlufi at føra hana, og hann tekur av. Síðan byrjar tíðarskeiðið við vegagerð við maskinu hjá landinum. Byrjað varð á Skipanesi og inneftir. Seinni varð farið til Suðuroyar at gera veg millum Hov og Tvøroyri. Eitt tíðarskeið búði Herluf við familju við Gjógv, meðan vegurin Gjógv-Funningur og Eiði varð gjørdur. Og eitt tíðarskeið í Vík, meðan vegurin Tjørnuvík-Streymnes varð gjørdur. Nú var gongd komin á vegagerðina og fleiri maskinur vórðu keyptar inn. Herluf tók ímóti teimum nógvu fyrstu maskinunum, og varð stórt álit víst honum í hansara yrki hjá Landsverkfrøðinginum. Hann arbeiddi sum traktorførari hjá landinum í samfull 40 ár.

Herluf hevur altíð átt bát og dámar serstakliga væl at vera á floti og til útróðrar. Seinnu árini sjálvandi sum stuttleikatúrar. Seyðahaldið hevur fylgt honum alt lívið og í egnum seyða- og hoygghúsi kunnu nógvar løtur koma og fara uttan at ein varnast tíðina.

Tær og konu tíni verður ynskt hjartaliga tillukku við degnum. Vónandi fáa tit ein góðan og hugnaligan dag.

Vinarlig heilsan

**Synir við familju**

## Almannastovan nýtt búmerki

**Í sambandi við 30 stovningardagin hevur almannastovan fingið nýtt búmerki, sum lýsingarstovan Krea í Saltangará hevur designað. Búmerkið varð alment sýnt fram undir móttøkuni seinasta fríggjadag**

almannastovan

TÍÐINDASKRIV

Vit síggja tríggjar formar, sum koma saman soleiðis, at annar endin á teimum fer inn í eina felags miðju, og hin gongur út úr miðjuni.

Formarnir eru allir eins, og saman mynda teir ein tríkant. Teir tríggir formarnir umboða tríggjar ymiskar persónar.

Hesir persónarnir hava tvær hendur, har vinstra hondin á øllum trimum er rætt inn móti eini felags miðju, og høgra hondin gongur út úr miðjuni. Hetta merkir, at allir partar geva og allir partar fáa.

Tað eru tríggir litir í búmerkinum. Hetta skal avspegla, at ein sær persónarnar, sum almannastovan tænir, sum einstaklingar, sum hava sín egna karakter og sítt egið virði, og sum ein tænir við atliti til tess.

**Prógv**

5. apríl tók Signa Joensen cand.phil.-prógv í »Norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum« á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya.

## Klædnaframsýning í Riberhúsi

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin tann 9. apríl frá kl. 16 - 20 verður klædnaframsýning í Riberhúsi í Fuglafirði, har høvi verður at síggja og keypa nýggju klæðir okkara til várið. Her fáast klæðini til ta litlu eins væl og ta stóru kvinnuna.

## Teitur í Rex fríggjakvøldið

**Teitur Lassen er aftur heima á klettunum og fer á pallin í Rex fríggjakvøldið**

TÓNLEIKUR

*dagfinn@sosialurin.fo*

Teitur Lassen er heima aftur á klettunum. Hann ferðast dúgliga úti í heimi við tónleiki sínum, men fríggjakvøldið er túrurin aftur komin, til at føroyingar sleppa at lurta eftir Teiti á palli.

Teitur fer fríggjakvøldið á pallin í Rex í Havn. Teitur og guitarin fara at spæla vælkendu løgini, ið hava víst seg at standa mát úti í heimi eisini, og kanska verður okkurt nýtt og forvintisligt at hoyra frá honum, tí nú er ein løta síðani at hann stóð á føroyskum palli seinast.

## Valarar hittast …

TÍÐINDASKRIV



"Je´eri Valari" verður allarhelst sungin nakrar ferðir hin 18. juni komandi, tá ið "Valarar hittast" í Valinum á Tvøroyri. Ein bólkur av "gomlum" valarum hevur tikið stig til at fyriskipa hátíðar- og veitsluhald fyri teimum, sum hava serligt tilknýti, eru uppvaksin í ella ættað úr Valinum. Tiltakið verður 18. juni 2005 í Valinum. Um dagin verður skipað fyri fólkafundi í Valarabrekkuni og forkunnugari framsýning í Fylking við gomlum myndum /filmum úr Valinum. Seinni á kvøldi verður ítróttarhøllin í Trongisvági karmur um stórfingna veitslu við góðum mati, undirhaldi og dansi. Fyrireikararnir rokna við at stórur áhugi verður fyri tiltakinum. Tað er neyðugt at melda seg til tiltakið, sum verður lýst í bløðunum.

AMIN JENSEN BLÆSER PÅ DK
KAPPING






**Vinn atgongumerkir**

Kundi tú ikki hugsað tær at farið ein túr til Fuglafjarðar leygarkvøldið at uppliva kenda danska skemtaran Amin Jensen á palli. Stórur áhugi er fyri at ogna sær atgongumerki til framførsluna hjá stóra dananum. Sosialurin hevur tó tryggjað sær nøkur atgongumerkir, og hesi hava tit lesarar møguleika at ogna tykkum.

Tað einasta, ið tit skulu gera, er at svara niðanfyri standandi spurningi rætt og senda okkum svarið, so at tað er okkum í hendi í seinasta lagi fríggjamorgunin klokkan átta.
Vinnararnir av atgongumerkjunum verða kunngjørdir í vikuskiftisblaðnum.

**Hvørja útbúgving hevur Amin Jensen?**

☐ Vøddamýkjari ☐ Plátusmiður

Navn:

Bústaður:

Tel:

Teldupostur:

Sendið svarseðilin til: Sosialurin · Postsmoga 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Amin Jensen kapping"